# Tín hugur hann ferðast

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Lot til andøvsgul av landsynningi og suðri og sólglottar, men eisini okkurt ælið. Hitin millum 10 og 13 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Lot til andøvsgul av landsynningi og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 11 og 14 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Lot til andøvsgul av vestri og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 9 og 12 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Mánadagin lot av ymsum ættum, ælingur og hitin millum 9 og 12 stig. Týsdagin upp í stívt andøvsgul av landsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 12 og 15 stig.



Vit droyma okkum burtur til líggjar hvítar pálmastrendur, so títt og knapt álmannakkin sigur, at nú eru tveir mánar til summarferiuna. So halda vit, at lukkan er at finna einastaðni har, sum lýtt er, og nógv fólk kemur saman. Helst skal tað vera langt burtur, tí tað halda vit, at vit eiga at gera.

Og so undrast vit á, hvat allir hesir útlendingarnir vilja, sum koma hendanveg. Ganga dobbaðir í vetrarklæðum millum bygdirnar og síggja heilt merkiligir út.

Men kanska hava tey verið á teimum hvítu strondunum og vilja nú síggja okkurt grønt? Ikki avsviðið og deytt. Men livandi.

Og ikki nýtist at fara til British Colombia ella Oregon fyri at síggja grønar furur daga upp móti fjallarygginum við bláum lofti í baksýni. Uttan bara til Kunoyar, har Nestindar sum pallmynd ger leikin eins livandi og fagran, sum tað, tú plagar at síggja á stóru putlispølunum, sum liggja í bókahandlunum.

Gamaní manglar tað obligatoriska tokið. Men slíkum hava tey ikki brúk fyri í Kunoy.

Har eiga tey eina viðalund uppi í einum botni, sum ein góðan seinnapart verður næstan eins heitur og einhvør suðurlendsk strond.

Munurin er bara, at tað er friðaligari, rúmligari og lættari luft í Kunoy.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 6 |
| Nuuk | 8 |
| Qaqortoq | 8 |
| Ammassalik | 11 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 12 |
| Seyðisfjørður | 8 |
| Tórshavn | 10 |
| Lerwick | 11 |
| Aberdeen | 19 |
| London | 19 |
| Tromsø | 14 |
| Bergen | 13 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 14 |
| Keypmannah. | 16 |
| Helsinki | 16 |
| Moskva | 22 |
| Berlin | 17 |
| Warzawa | 14 |
| Kiev | 13 |
| Bukarest | 21 |
| Paris | 23 |
| Madrid | 28 |
| Róm | 24 |
| Malorca | 24 |
| Athen | 27 |
| Malta | 25 |
| Tunis | 27 |
| Beijing | 29 |
| New Dehli | 35 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | -- |
| Sydney | 15 |
| New York | 23 |
| Miami | 31 |
| Los Angeles | 24 |
| Meksikobýur | 20 |
| Panama | -- |
| La Paz | 12 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 17 |

### LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 987 hPa. í útsynning úr Íslandi fer spakuliga eystureftir og grynnist. Eitt annað lágtrýst, 998 hPa. í landnyrðing úr Føroyum fer spakuliga norðureftir.




**Í dag:**
Lágtrýstið sunnan fyri Ísland fer framvegis spakuliga eystureftir. Óstøðug luft verður yvir Føroyum teir fyrstu dagarnar.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 14/07 kl. 06[00]–15/07 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 10,6°
Minsti hiti máldur í juli: 0,4° - Mesti hiti máldur í juli: 20,2°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 1,2 mm – mált frá 14/07 kl. 06[00]–15/07 kl. 06[00]
Avfallið higartil í juli: 20,3 mm





fæst á apotekunum kring landið


## VESTFALLSKYRRINDI

9. juli: Seinna kvarter
14. juli: Mánin longst frá jørðini
17. juli: Tendring
25. juli: Fyrra kvarter

Kelda. Álmanakkin 2004

| | Suðuroyar-/ Vágafirði | | Skúvoyar-/ Skopunarfirði | | Hestfirði/ Sundalagnum | | Vestmanna-sundi | | Mykines-firði | | Nólsoyar-firði | | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi | | Leirvíksfirði/ Haraldssundi | | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði | | Hvanna-sundi | | Fugloyar-firði | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Dagur | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. |
| 16. juli | 06.52 | 19.15 | 05.52 | 18.15 | 06.07 | 18.30 | 08.52 | 21.15 | 09.52 | 22.15 | 05.07 | 17.30 | 04.07 | 16.30 | 07.07 | 19.30 | 08.07 | 20.30 | 06.37 | 19.00 | 07.52 | 20.15 |
| 17. juli | 07.37 | 20.00 | 06.37 | 19.00 | 06.52 | 19.15 | 09.37 | 22.00 | 10.37 | 23.00 | 05.52 | 18.15 | 04.52 | 17.15 | 07.52 | 20.15 | 08.52 | 21.15 | 07.22 | 19.45 | 08.37 | 21.00 |
| 18. juli | 08.22 | 20.45 | 07.22 | 19.45 | 07.37 | 20.00 | 10.22 | 22.45 | 11.22 | 23.45 | 06.37 | 19.00 | 05.37 | 18.00 | 08.37 | 21.00 | 09.37 | 22.00 | 08.07 | 20.30 | 09.22 | 21.45 |
| 19. juli | 09.06 | 21.27 | 08.06 | 20.27 | 08.21 | 20.42 | 11.06 | 23.27 | — | 12.06 | 07.21 | 19.42 | 06.21 | 18.42 | 09.21 | 21.42 | 10.21 | 22.42 | 08.51 | 21.12 | 10.06 | 22.27 |
| 20. juli | 09.48 | 22.09 | 08.48 | 21.09 | 09.03 | 21.24 | 11.48 | — | 00.27 | 12.48 | 08.03 | 20.24 | 07.03 | 19.24 | 10.03 | 22.24 | 11.03 | 23.24 | 09.33 | 21.54 | 10.48 | 23.09 |